Fólkafloksforfylging anno 1987

floksfólk hava talað at. At tey ikki gera tað, kann so bert takast sum at tey tigandi taka undir við skrivingini í Dagblaðnum.

Upp í politiska vavstur og greyt sín roynir stavnamaðurin at draga persónligar eginleikar og enntá familjuviðurskifti hjá umrøddu fólkum.

Slíkur persónur er tí ikki verdugur at umboða eina føroyska veljarafjøld hvørki á løgtingi ella á fólkatingi.

Vónandi gongur tað upp fyri føroyinginum, hvat stavnamaðurin í veruleikanum stendur fyri og vil: at innføra fólkafloksdiktatur í Føroyum við at undirgrava demokratiið.

Veljarin verður at avgera um hann skal sleppa hetta. Við í sínum metingum eigur hann so eisini at hava líkheitina millum Dagblaðið — málgagn Fólkafloksins — og nazistiska blaðið »Nationalsocialisten«.

Vit endurpenta grein úr Nationalsocialisten frá 29. august 1936. Innihaldið hevur júst sama boðskapin, sum vit í dag finna í skjaldrarmerkinum hjá málgagni fólkafloksins: útspilling og forfylging.

Jan Müller

Søgunnar sannleiki ella...

Jóhann og Stalin

Tað mundi vera meir fyri at rætta Gorbatjov eina hjálpandi hond til at villleiða vesturheimin, enn tað var fyri at bera fram søgunnar sannleika um ferðsluræðið hjá Stalin, at Jóhann Mortensen í útvarpstíðindunum leygarkvøldið gav stóra búskapar- og samfelagsarkitektinum í Sovjet ringa umtalu.

Útvarpstíðindi leygarkvøldið. Kommunusosialistur hartar vulgérsosialist. Javnaðarpolitikarin Jóhann Mortensen sigur fyri opnari mikrofon, at Josef Stalin var eitt bølmenni.

Jú, vist tola oyruni nógv av. Leygarkvøldið mundi verðið galið, tá Jóhann Mortensen fór undir ein lestur, sum var vendur móti Josef Stalin, einaræðisharra og arkitekti av sosialistiskum búskapi í Sovjet.

Tað var tá frálíkt, at Útvarpið eisini av og á kann venda broddinum av negativum ámæli eystureftir. Spell, at tað er so sjáldan sum lundi á jólanátt.

JAVNAÐARPOLITIKARIN JÓHANN

Leygarkvøldið var tað so javnaðarpolitikarin Jóhann Mortensen, sum starvast á tíðindamonopolinum til dagligt, sum gav Stalin av grovillini.

Prískligt at hoyra, og visti ein ikki betur, ja so hevði ein hildið, at her var eitt kærkomið høvi hjá einum hóvligum sosialisti til at skora nøkur stig í ideologiska dystinum móti einum meir harðvendum og reinlinjaðum bróðuri í verðsliga andanum.

Men so einfalt var hetta nokk ikki. Annars skuldu Útvarp Føroya havt líka góðar møguleikar sum øll onnur — ja enntá betri við tí floymi av upplýsing, sum streymar inn í posti og telexi — til at kenna størsta drápsmann í heimssøguni.

TRÍGGJAR FERÐIR SO NÓGV

Tað átti at kenst sum ein náttúrlig skylda hjá full-time ideologum í Sortudíki at mint almenningin á innføring av sosialistiskum búskapi við makt í Sovjet hevur hesi 70 árini kostað millum tvær og tríggjar ferðir so nógv mannalív, sum týska álopið undir øllum krígnum kravdi.

Flestu av hesum 50-60 milljónunum av russiskum deyðsofrum á altari sosialismunnar lótu lív fyri drápsmannahond Stalins. So hesin hópdrápsmaður hevur uppiborið alt tað ringa ámæli, sum mannaættin kann geva honum — til ræðslu og ávaringar fyri núlivandi og komandi ættarlið.

PUSSA GLORIU GORBATJOVS

Men tíðindamonopol okkara ætlaði ikki at gera Stalin nakran óbeina. Ið hvussu er ikki sum høvuðsmál við tíðindastubbanum.

Hann snúði seg nevniliga um eina grein, sum ein sovjettiskur søgugranskari — sjálvandi við loyvi frá KGB — hevði skrivað í eitt russiskt tíðarrit. Greinin fanst at Stalin og kravdi eina bersøgna og sanna lýsing av ræðslustýri hansara.

Tað merkir einfalt, at Stalin var undirorðnaður í tíðindastubbanum leygarkvøldið og bert ein grundgeving hjá mikrofonhaldaranum til at prógva fyri føroyskum lurtarum, at Gorbatjov er ein fittur fýrur, sum vit eiga at hava álit á og stuðla í hansara ætlanum at virka fyri (einvegis vesturlendskum) avvápnaði og niðurdubbing.

Jóhann læt seg misbrúka (við vilja ella óvart) til at pussa gloriuna hjá Gorbatjov.

TÍÐINDAVIRÐI

Spell hjá okkum mongu, sum halda høvuðsuppgávu Útvarpsins vera at halda við líka minnið um dýra og ræðuliga kostnaðin av at innføra sosialismu í Sovjet, at vita, at Jóhann og Útvarp Føroya mest av tilvild nevndu hópdráp og ræðuleikar undir Stalin, tí at okkurt avlát má gjaldast fyri at kunna prógva, hvussu deiligt og frítt tað núe r blivið í Sovjet undir brosandi Gorbatjov (og hansara penu konu).

»Stalinismens fascination for vore intellektuelle« æt frálíka bókin hjá danska søgugranskaranum Bent Jensen professara.

Í bókini greiðir høvundin so meistarliga frá, hví vesturlendskir intellektuellir lótu seg tøla og blinda av sosialismunnar gyklara, Stalin.

Síðan er sosialistiska hvørvisjónin avdúkað og líkdungarnir vórðnir opinberir — fyri tann, ið vil síggja. Fyrrverandi umberararnir, hámetararnir og harvið stuðlarnir hjá Stalin, tí hann tá var framherji heimssosialismunnar, kropnir í músahol.

Men hentum býttlingum er framvegis ørgrynni av — m.a. teir, sum nú á døgum hava sum sosialistiska missión í politiskum og dagligum arbeiði at gera sítt ítarsta fyri at renna sneisaørindi fyri arvingin hjá Stalin, nevniliga Gorbatjov.

BOÐFRETAR OG SKUTILSVEINAR

»Sosialisman við einum menniskjansligum andlitii« — Hygg bara at tí brosandi Gorbatjov, sum loyvir einum »andstøðingi« (les: boðfreti hjá KGB og Kreml) at skriva niðursetandi um Stalin í russiskum tíðarriti.

Og hygg so at Jóhann, sum straks brúkar sítt tíðindamonopol til at bera boðini víðari til Føroya fólk.

Soleiðis arbeiða kommunusosialistar og vulgérsosialistar hond í hond tvørtur um landamark. Endamálið er at innføra heimssosialismuna.

Í teirra ideologisku matematikk hava miljónirnar av ofrum so óvarska lítlan týdning. Stalin fagnaði teir, meðan hann var á lívi. Nú brúka teir, meðan hann var á lívi. Nú brúka teir hann til at skorða upp undir arving Stalins í Moskva, Gorbatjov.

Útvarpsgjaldið fíggjar undirgravingina og villleiðingina.

Ó.B.

So lætt er hjá einum marxisti at skifta støðu. Stalin hevði ført seg fram sum heimssosialismunnat ídturverja móti fascismuni øll triatiárini til 1939, tá hann eftir fáum døgum fekk í lag vinar- og ikki-álopssáttmála við Nazi-Týskaland, hvørs uttanríkisráðharri, von Ribbentrop, brosar saman við Stalin um kvøttið. Alla einaræðistíð sína varð Stalin dýrkaður sum avgudur av øllum vinstrahallum kring heimin. Í dag verður hann spíltur út — ikki júst fyri illgerðir og hópdráp síni, men fyri at skorða upp undir verandi sovjettiska leiðaran Gorbatjov

Við báðum beinum yvir til »fíggindan«:

Sonni úr Útvarpinum

Eftir trúgva tænastu sum ein av ideologum útjavningarinnar í Sortudíki skiftir Sonni Smith nú arbeiðsgevara.

Ikki til at gerast media-ráðgevi hjá einum hart trongdum Atla Dam til komandi val (sum mangur mundi vænta), men sum teksthøvundur hjá Team 85, sum livir av at gera lýsingar fyri føroyskar handlar.

Herfyri stóð ein starvslýsing í bløðunum (ella var tað bara í tí eina?) eftir fólki við hegni til at skriva føroyskar lýsingatekstir.

Tað var Team 85, størsta lýsingastovan í landinum, sum vildi hava ein effnan málsnilling. Lønin var góð, nakrar 20.000 um mánaðin.

Tað var væntandi, at onkur blaðmaður á føroysku bløðunum fór at søkja, tí bløðini hava so lítið av lýsingainntøkum, at tey hava ikki ráð til at løna sínum blaðfólki so væl, sum tey hava uppiborið, og sum ynskiligt kundi verið.

VÆL EGNAÐUR

Kann eisini vera, at fleiri hava søkt. Men hvussu er og ikki, so hevur Sonni Smith fingið strvið. Málsliga hegnigur maður, er ikki sørur fyri listarligar gávur, hóast ikki skald ella høvundur á virðislønarstigi.

Úrslitið verður uttan iva, at Dimmalætting verður nakað væl prýdd við einum enn vakrari lýsingamáli enn higartil, eftir at lætta, náttúrliga og køna hond Sonna hevur verið á lýsingunum.

Soleiðis endar (fyribils ið hvussu er) ein blaðmannakarriera av teimum longru í Útvarpinum. Ein rólig og ljóðmikil mikrofonrødd ljómar ikki longur inn í stovur okkara.

IDEOLOGUR FARIN

Samstundis missir sosialisman ein av sínum trúgvastu stuðlum í Sortudíki. Nú má onkur annar til at pjátra við Hans Holm um »randstadør« og »høgrafascistisk militerstýrør«. Ísrael missir ein mótstøðumann, og PLO má lata sær lynda at klára seg við vininum Winthereig einsamøllum.

Botha má finna onkran annan at knokkroyta seg. Pinochet sleppur at rinda møðina í nakrar dagar. Reagan fær kanska hvíld til ein ríðitúr á ranchuni aftrat áðrenn næstu salvu úr Gundadali.

Sonni leggur tær ideologisku árarnar inn.

Men øll tey, sum tysta eftir rættvísi og niðurjavning í Afrika (har alt liggur slættað við jørðina), í Suðuramerika (har Castro og Ortega klára seg ringast), Vesturheimi (har Chirac, Reagan, Kohl, Schlüter og Thatcher stjórna við hepnari hond) og í Sovjet (har miðal lívialdurin er fallin niður í 62 ár), kunnu ugga seg við, at maður kemur í mans stað.

Sortudíki skal nokk finna eitt fólk til at fylla út í skógvarnar hjá Sonna.

Í KAPITALISMUNNAR FØVNING

Mangur mundi vænta, at um Sonni fór at taka lopið av síni almennu rók, so fór tað at verða upp á eina hægri rók í sama almenna bergi. Til dømis man Atli Dam vera so mikið hart kroystur, at hann hevur fyri neyðini ein listilærdan mediaráðgeva til valið komandi.

Men nei. Sonni loypir nógv longri enn so og enntá yvir á eina privata rók. Satt at siga eitt fitilendi við nógvum og síðum grasi at leska sær í.

Hvussu hesin landskendi sosialistiski agitator sameinir hetta nýggja starv í kapitalismunnar tænastu við ideologisku sannføringina, má so vera ein gáta fyribils. Ið hvussu er, til hann kemur við einum bekennilsi um tímiliga umvending til betri tankar og (sjálvandi) tilveru.

REKLAMAN FÍGGINDIN

Fyri tann rætttrúgvandi sosialistin er reklaman ímyndin av kapitalismunnar falsi undir fríum skinni.

Hvussu ofta hava javningar ikki lýst reklamuna í bann, tí hon sigst ala eina falska kenslu av tørvi eftir alskyns vørum í brúkaranna brósti?

Lívsgleðin, bjartskygnið og framburðurin, sum lýsir úr reklamuni, fær øði í hvønn sosialistiskan barm. Reklamunnar heimsmynd verður lastað, tí hon fjalir andsagnirnar millum framleiðara og brúkara, millum stættirnar, sum liva av profitti, øðrumegin og av at framleiða hetta meirvirði og av at keypa »ónyttufjasið« hinumegin.

Reklaman útnyttar kynsbýtið og erotiserar kvinnuna, pástendur kvinnusakin. Kapitalurin misnýtir reklamuna til at tøla brúkaran til óneyðuga keypstrongd, samstundis sum hon loyvir kapitalinum at lumpa fólkið til villari umsetning og meiri profitt. Reklaman sigst hava longt kapitalismunnar lívitið og seinkað komu sosialismunnar.

BETRI RÁÐ TIL KOLLVELTINGINA

Henda beiska bitan má Sonni nú til at eta í seg aftur. Av sonnum ein »Mannafalsdalur« fyri ein rætttrúgvandi sosialist.

Idealisman og ideologiin mugu leggjast á hillina í eina tíð.

Sosialurin kann ugga seg við, at nú hevur sosialisman hóast alt fingið ein troyanskan hest og ein fót í hurðagloppið hjá kapitalismuni, so tá Team 85 regnar á prest (Dimmu), dryppar kanska á dekn (Sosialin).

Teir vinstrahallu hugsa kanska, at hesin nýggi reklamutølarin minnist til orðini hjá Lenin, at »tann síðsti kapitalisturin skal sjálvur sleppa at selja okkum tað reipið, vit skulu heingja hann í«, og at tey eru orsøkin til starvsskiftið.

Tað sær kanska bara út, sum Grímur á Skóg er hvokkin og farin undir kommersialismunnar skjúrtufald.

Men hvussu verður og ikki við ideologisku sannføringini hjá Sonna frameftir, so ger tann góða lønin fyri nýggja arbeiðið, at hann fær betri ráð til at halda fast um kollveltingina.

O.B.



Sonni Smith fer frá sínum almenna arbeiðsgevara fyri at tæna kapitalismuni

Nakað herfyri hevði útvarpsmaðurin Jóhan Mortensen ein tíðindastubba í útvarpinum um Stalin. Hesin tíðindastubbi varð lutvíst endurgeving av eini grein í danska vinstrablaðnum Vestkysten.

Vit prenta stubban í Vestkysten og so tað sum Óli Breckmann fekk burtur úr øllum hesum

Omvurdering af Stalin

En officiel sovjetisk historiker krævede lørdag en fuldstændig omvurdering af Josef Stalins regime og sagde, at en undertrykkelse af historiske fakta fratager befolkningen dens selvbevidsthed og åndelige styrke.

Historikeren Jurij Afanasjev sagde i avisen Sovjetskaja Kultura, at det ikke er tilstrækkeligt at afvise Stalins forfølgelser af millioner af udskyldige Sovjet-borgere i 1930'erne med, at der var tale om »fejltagelser«, således som sovjetiske historikere hidtil har gjort det.

Avisens interview med Afanasjev markerede endnu et skridt i den kampagne, som sovjetiske intellektuelle har sat i gang for at få en åben debat om Stalins forbrydelser og få gennemført en rehabilitering af de ledende revolutionære skikkelser, som Stalin lod henrette under sit brutale 30-årige styre.

- Jeg mener, at tiden er inde til at studere hele det kompleks af problemer, der er forbundet med Stalins personkult, sagde Afanasjev, der er chef for det sovjetiske Intitut for Historiske Arkiver.

- Vi er ikke i besiddelse af forskningsmateriale om dette kolossale spørgsmål, mens ikke-marxistiske historikere i Vesten har publiceret tusinder af værker om emnet, tilføjede han og henviste til, at kommunistpartiet i en kortvarig periode i 1950'erne under den daværende leder Nikita Khrustjov udsendte en række erklæringer, der kaldte Stalin-tiden for en epoke, der byggede på lovløshed og tyranni.

Den sovjetiske leder Mikhail Gorbatjov sagde i en tale i sidste måned, at der ikke børe være blanke sider i landets historie, og at der bør ske en rehabilitering af dem, der deltog i 1917-revolutionen, og som siden blev udrenset.

Ársvikarur til Kaldbaks skúla

Søkt verður eftir ársvikari til Kaldbaks skúla fyri skúlaárið 1987/88.

Umsøkjari, ið kann undirvísa í gentuítrótti, evning og enskum hevur fyrimun.

Umsóknir verða at senda til Tórshavnar Skúlaráð, Vaglið 1, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 13. juli 1987.

TÓRSHAVNAR SKÚLARÁÐ

fk

Deildarleiðari til Keypssamtøkuna í Vágum

Við tað at verandi leiðari hevur fingið annað leiðarastarv, verður søkt eftir nýggjum deildarleiðara.

STARVSØKI: Leiðarin skal við ábyrgd yvirfyri stjórn og fyristøðumanni, standa fyri leiðsluni bæði viðvíkjandi starvsfólkunum og tí, sum handlinum viðvíkur, herundir innkeypi og roknskapi.

LØN: Sambært sáttmála millum FK og deildarleiðararnar.

SETAN: Starvið verður at seta frá 1. august 1987 ella eftir nærri avtalu.

UMSÓKNARFREIST: Skrivlig umsókn skal vera FK í hendi í seinasta lagi 10. juli 1987 og verður hon at stíla til stjórnina og send fyristøðumanni FKs, 188 Hoyvík.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til fyristøðumann FKs, Finn Nielsen, tlf. 14149 ella 15442.

KEYPSSAMTØKAN